Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 29.01.2026 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Tórur Didrik Djurhuus
Uni Rasmussen

Varalimir:

Ikki møtt: Hanna Jensen

Nevndarskrivari: Erik Lervig


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 1/26 | 24/00552-19 | Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, Neyst, matr. nr. 70 18, Syðrugøta | 2 |
| 2/26 | 25/00499-9 | Bygging uttan loyvi - matr. nr. 47 í Syðrugøtu (skúrur) | 4 |
| 3/26 | 25/00528-5 | Umsókn um byggiloyvi til hjall - matr.199i í Syðrugøtu | 7 |
| 4/26 | 26/00043-1 | 26/00043 - frágreiðing og tilmæli - Avtala um samstarv um integratiónssamskipara millum Klaksvíkar-, Eystur-, Fuglafjarðar, Kunoyar-, Hvannasunds-, Viðareiðis- og Fugloyar kommunur | 8 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 1/26 Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, Neyst, matr. nr. 70 18, Syðrugøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.01.2026 | 1/26 | 24/00552-19 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 1/26 | 24/00552-19 |

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**

Viðv. umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 66 og 18 í Syðrugøtu.

**Lýsing av málinum**

Eigarinir av matr 66 og 18 hava søkt um frávik til felagsmøn á teirra neystum í Syðrugøtu.

Neystini liggja í G2 neystaøkinum í Syðrugøtu í øki 1 sambært serstøku byggisamtyktini fyri økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri G2 neystaøki í Syðrugøtu:

§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING

4.1. Byggistig má í mesta lagi verða 1,0.

4.2. Neyst í øki 1 skulu hava møn og hava takhall millum 25 og 45 gr.

§8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Sambært serstøku byggisamtyktini skulu øll neystini hvør sína møn. Tá hesir matriklarnir eru sera smáir, hóskar tað væl til umhvørvið at hesi neystini hava felagsmøn.

**Skjøl**

- Tekningar.pdf

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva frávik til felagsmøn. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 21. januar 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. januar 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

# 2/26 Bygging uttan loyvi - matr. nr. 47 í Syðrugøtu (skúrur)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.01.2026 | 2/26 | 25/00499-9 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 2/26 | 25/00499-9 |

**Málslýsing:**

**Upprunin til málið**
Úthús bygt ov tætt mark.

**Lýsing av málinum**
Eysturkommuna fekk fráboðan tann 7. november 2025 av eigaranum av matr. nr. 164 í Syðrugøtu. Eigarin boðaði frá, at grannin, eigarin av matr. nr. 47 hevði bygt eitt úthús uppá at markinum millum matr. nr. 47 og 164 í Syðrugøtu.

Tann 7. desember 2025 sendi eigarin av matr. nr. 164 eina skrivligari klagu til Eysturkommunu um viðurskiftini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Bygging sum ikki krevur byggiloyvi eru t.d. hjallar, vakstrarhús ella lítið úthús

> Ætlar tú at byggja úthús, vakstrarhús, hjall ella líknandi, kanst tú gera hetta uttan byggiloyvi. Treytin er, at bygningurin er minni enn tíggju fermetrar til støddar, og at bygningurin ikki er upphitaður.
>
> Harafturat skalt tú lúka hesi krøvini:
>
> Í mesta lagi tveir tílíkir bygningar kunnu vera á matrikklinum
>
> Frástøðan til aðrar bygningar á sama matrikkli skal í minsta lagi vera 2,5 metrar
>
> Frástøðan til mark skal í minsta lagi vera ein metur
>
> Hæddin á útveggjum ella tekju kann í mesta lagi vera 2,5 metrar yvir planeringshæddina

Ásetingarnar í Bygningskunngerðini fyri smáir bygningar á í mesta lagi 10 fermetrar:

### 2.2.3.5 Smáir bygningar á í mesta lagi 10 m²

Stk. 1
Ásetingarnar í kap. 2.2.3.5 eru bert galdandi fyri smáar bygningar á í mesta lagi 10 m². Tó verður eisini víst til kap. 2.2.3.4, stk. 2, nr. 2.

Stk. 2
Upp til 2 smáir bygningar kunnu gerast á hvønn matrikul, um treytirnar í nr. 1-3 eru loknar:

1) Víddin á tí einstaka bygninginum má í mesta lagi vera 10 m².
2) Fráleikin til aðrar bygningar á sama matrikli skal vera í minsta lagi 2,5 m.
3) Eingin partur av útveggjum ella tekju má vera hægri enn 2,5 m yvir planeringshædd.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Starvsfólk frá teknisku umsiting hava verið á staðnum og staðfest at úthúsið ikki er bygt á tráð við galdandi reglur.

Úthúsið er bygt uttan byggiloyvi og lýkur ikki krøvini viðvíkjandi frástøðu til grannamark og hæddarviðurskiftum. Sambært reglum kunnu úthús, ið eru minni enn 10 fermetrar, byggjast uttan byggiloyvi. Tó skulu krøv um hædd og frástøðu til grannamark yvirhaldast, sum greitt er frá á heimasíðuni hjá Eysturkommunu. Í hesum førinum eru hesi krøv ikki hildin.

Úthús minni enn 10 fermetrar kunnu byggjast uttan byggiloyvi, tó skulu hædd og frástøða frá grannamarkið yvirhaldast, sum lýst á heimasíðuni hjá Eysturkommunu. Í hesum førum skal er hetta ikki yvirhildið.

Eysturkommuna hevur samtykt, at smærri bygningar, so sum hjallar, vakstrarhús og smá úthús, skulu standa minst ein metur frá mark. Hetta kravið er tó ikki ásett í bygningskunngerðini.

Við skriv dagfest 24. november 2025 varð eigaran av matr. nr. 47, heittur á um at flyta úthúsið.

Seinni er skriv móttikið frá eigaranum av matr. nr. 47, har hann greiðir frá viðurskiftunum og samstundis søkir um frávik til úthúsið.

Støða skal takast til um fráviki skal játtast.

**Skjøl**
- Viðv. bygging á matr. 47 í Syðrugøtu
- Re: Viðv. bygging á matr. 47 í Syðrugøtu
- 25/00458-13 – Re: Viðv. bygging á matr. 47 í Syðrugøtu
- Viðv: skúri.msg

| |
|---|
| • Klaga og áheitan um myndugleikaviðgerð av møguliga ólógligari bygging á matr. 47, Úti í Bø 24, Syðrugøtu.<br>• Umsókn um frávik. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá at geva frávik fyri úthúsið, soleiðis sum tað nú er staðsett. Úthúsið er í stríð við galdandi reglur um frástøðu til grannamark og hædd. |

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 21. januar 2026</u>**
Heri og Uni mæla til at geva frávik til úthúsið, soleiðis sum tað nú er staðsett.

Ann tekur støðu á býráðsfundinum.

**<u>Býráðið 29. januar 2026</u>**
Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í byggi- og býarskiapanarnevndini:

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Uni Rasmussen, Heri Mikálsson

**Atkvøður ímóti:**
Magnus Skoralíð, Ann Fuglø, Pól í Skorini, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Tórur Didrik Djurhuus

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá umsitingini:

**Atkvøður fyri:**
Magnus Skoralíð, Ann Fuglø, Pól í Skorini, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Tórur Didrik Djurhuus

**Atkvøður ímóti:**
Per Martin Gregersen, Uni Rasmussen, Heri Mikálsson

## 3/26 Umsókn um byggiloyvi til hjall - matr.199i í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.01.2026 | 3/26 | 25/00528-5 |
| 2 Býráðið | 29.01.2026 | 3/26 | 25/00528-5 |

**Málslýsing:**

Mál:
Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi til uppsetan av hjalli á matr. nr. 199i í Syðrugøtu. Umsøkjarin ætlar at byggja hjall aftrat verandi sethúsum á ognini.

Hjallurin er staðsettur 3,57 metur frá vegi, meðan galdandi byggilinjan er 5 metur frá vegi. Tí er neyðugt við fráviki frá byggilinjuásetingini fyri at kunna veita byggiloyvi.

Skjøl
Sí viðfest skjøl.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at geva frávik.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 21. januar 2026**
Byggi- og býraskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 29. januar 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipnarnevndin

## 4/26 26/00043 - frágreiðing og tilmæli - Avtala um samstarv um integratiónssamskipara millum Klaksvíkar-, Eystur-, Fuglafjarðar, Kunoyar-, Hvannasunds-, Viðareiðis- og Fugloyar kommunur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 22.01.2026 | 2/26 | 26/00043-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 26.01.2026 | 1/26 | 26/00043-1 |
| 3 Býráðið | 29.01.2026 | 4/26 | 26/00043-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í samband við, at lógin um integratión (Integratiónslóg nr. 146 frá 20 .desember 2024) er sett í gildi, hava umsitingarnar í Klaksvíkar kommunu, Fuglafjarðar kommunu og Eysturkommunu samskift um eitt møguligt samstarv.<br>Vísandi til sjálva lógina, skal kommunan skal í seinasta lagi 01. juli 2026 hava sett ein integratiónssamskipara og við heimild í lógini §4, stk. 2, kunnu kommunurnar samstarv um integratión og integratiónssamskipara. Við støði og í heimild í hesum, er gjørt eitt uppskot um avtalu um samstarvsavtalu millum nevndu kommunur (uppskotið er hjálagt). |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Fyri kostnaðin av hesum samstarvi rindar hvør luttakandi kommuna í mun til íbúgvaratalið 1. januar í árinum frammanundan.<br>Fyri Eysturkommunu er kostnaðurin kr. 145.008 árliga (samsvarandi íbúgvaratalið og íroknað tiltøk og aðrar útreiðslur).<br>Eingin peningur er avsettur á Fíggjarætlanini fyri 2026 til nevnda endamál. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við hjálagda uppskoti um samstarv og at fíggjarnevndin finnur pening til endamálið. |

### Trivnaðarnevndin 22. januar 2026
Mælt verður til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

### Fíggjarnevnd 26. januar 2026
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini

**Býráðið 29. januar 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndni og fíggjarnevndini

fundurin lokin kl. 19.00

____________________________
Per Martin Gregersen

____________________________
Magnus Skoralíð

____________________________
Hanna Jensen

____________________________
Ann Fuglø

____________________________
Heri Mikálsson

____________________________
Pól í Skorini

____________________________
Unn Jarnskor
Ellingsgaard

____________________________
Tórur Didrik Djurhuus

____________________________
Uni Rasmussen